## TIL ARBEIÐIS

**LAGT TIL RÆTTIS:** Vilmund Jacobsen, vilmund@sosialurin.fo



### FAKTA:

**Navn:** Annika Sølvará
**Starv:** Stjóri í Granskingarráðnum
**Starvsfólk:** Hálvt triðja, pluss leyst
**Besta við arbeiðnum:** At tingini flyta seg
**Ringasta við arbeiðnum:** Eg stórtrívist...
**Staður:** Bryggjubakki 12, Tórshavn

*– Almenn kunning um gransking og menning er nakað, sum eg haldi hevur alstóran týdning sigur Annika Sølvará*

SAVNSMYND

# Annika stýrir gransking

– EG **STÓRTRÍVIST** OG HALDI, AT OKKARA **ARBEIÐI** ER ÓTRÚLIGA **SPENNANDI** OG FJØLBROYTT. TINGINI **FLYTA** SEG RÆTTA **VEGIN**, KANSKA EITT SINDUR **SPAKULIGA** – OG **TÓ** FØLI EG, AT TEY FLYTA SEG. EG HALDI, AT **NÓGV** KANN HENDA **AFTRAT**, OG OKKARA **UPPGÁVA** ER STÓR, SIGUR **ANNIKA SØLVARÁ**, STJÓRI Í **GRANSKINGARRÁÐNUM**

Annika Sølvará er stjóri í Granskingarráðnum. Hon tók við hesum starvi hin 1. desember 2007. Útbúgvingin hjá henni er cand.mag. í enskum og søgu. Hon las á Århus Universiteti árini 1990-1997 og hevur sergrein í tí, sum rópt verður post-kolonialum bókmentum.

– Mínar uppgávur í Granskingarráðnum fevna um alt frá strategiskum spurningum, kunning, vegleiðing og eftirliti til at gera kaffi, sum hon tekur til.

Hon sigur, at tað eru nógvir fundir og í tíðarskeiðum er eisini ferðing.

– Uppgávurnar fevna soleiðis um bæði stórt og smátt, og hetta er eisini náttúrligt, tá vit eru eitt lítið arbeiðspláss. Vit eru hálvt triðja fólk umframt fýra fólk í 10% starvi.

Omanfyri Anniku er ein nevnd við sjey fólkum. Hetta eru tey, sum játta stuðul og taka ymiskar aðrar avgerðir.

– Hóast vit eru fá á arbeiðsplássinum á Bryggjubakka, hava vit nógv samskifti við fólk. Vit hava stívliga 50 verkætlanir, sum fáa stuðul frá okkum í løtuni. Fyri hvørja verkætlan er ein fakligur leiðari/granskari, ein stjóri ella fíggjarleiðari, umframt ofta nøkur fólk aftrat, sum vit samskifta regluliga við.

Annika Sølvará vísir á, at arbeiðsuppgávurnar eru skiftandi, og viðhvørt er rættiliga stórt trýst á, soleiðis sum tað var herfyri, men nú er meira liviligt aftur, sum hon tekur til.

### Ymiskar uppgávur

Hon sigur, at høvuðsuppgávurnar kunnu lýsast soleiðis, at Granskingarráðið í fyrsta lagi umsitur Granskingargrunnin og soleiðis lýsir stuðul leysan, vegleiðir umsøkjarum, viðger umsóknir, tryggjar at tey røttu fáa stuðulin og hevur eftirlit við, at stuðulin verður brúktur til tað, sum hann er játtaður til.

Í øðrum lagi er uppgávan at ráðgeva landsstýrinum og øðrum í granskingarpolitiskum spurningum.

– Hetta er eitt vítt hugtak, men eitt ítøkiligt og fekst dømi er yvirskipaði granskingarpolitikkurin, Vitan & Vøkstur, sum nýliga er samtyktur. Vit eiga ein stóran lut í hesum arbeiði. Vit gera eisini viðmerkingar til lógaruppskot, tilmælir av ymiskum slag, og vit luttaka í ymiskum arbeiðsbólkum.

Í triðja lagi er ráðið við í ES-granskingarsamstarvi, har Annika sjálv luttekur í teimum yvirornaðu bólkunum, meðan hini starvsfólkini taka sær av teimum fakspesifikku uppgávunum.

– Vit skulu kanna møguleikar, kunna í Føroyum og ES um møgulig støð at søkja/økir at samstarva á. Ein stór uppgáva er eisini at kunna um og kveikja áhuga fyri gransking í breiðari merking í almenna rúminum.

Annika vísir á, at Granskingarráðið eisini skipar fyri tiltøkum, eitt nú Vísindavøku og Vitan á Skák, og tey hava eisini sína heimasíðu www.gransking.fo – og tíðindabrøv, sum tey senda út umleið 14. hvønn dag.

### Nógv áhugamál

– Eg stórtrívist og haldi, at hetta er ótrúliga spennandi og fjølbroytt. Tingini flyta seg rætta vegin, kanska eitt sindur spakuliga – og tó føli eg, at tey flyta seg. Eg haldi, at nógv kann henda aftrat, og okkara uppgáva er stór.

Hon sigur, at starvið sum stjóri í Granskingarráðnum er eitt tíðaravmarkað starv, men at útlit eru fyri ymiskum umskipingum innan alt ov leingi.

– Tíðin fer at vísa, hvat fer at henda, og eg haldi í øllum førum ikki, at eg eri liðug við hetta økið, leggur Annika Sølvará aftrat.

Men er tað nakað, sum stjórin í Granskingarráðnum veruliga brennir fyri?

– Ja, almenn kunning um gransking og menning er nakað, sum eg haldi hevur alstóran týdning. Tað eru so ómetaliga nógvar spennandi søgur at siga frá. Eg haldi, at vit mugu fortelja fólki, hvat gransking og menning kann gera fyri okkum og samfelagið. Politiska skipanin og almenningurin eiga at vita, hvat fæst fyri almennu játtanina, sum verður latin til gransking og menning. Við kunning eiga granskarar at vísa á, hví teirra arbeiði er so týdningarmikið, og hví tað skal halda fram og styrkjast.

Annika sigur, at hon annars brennir fyri øllum møguligum, eitt nú nýggjum Tjóðpalli, sterkari Fróðskaparsetri, einum betri samfelag her hjá okkum – og einum betri heimi yvirhøvur.

### Hvør er Annika?

Annika Sølvará er fødd í Danmark, men hevur føroysk foreldur, Ingu og Mikkjal Joensen. Hon er elst av trimum systrum. Familjan flutti til Klaksvíkar, tá hon var 4 ára gomul.

Barna-og framhaldsskúlan gekk hon í Klaksvík, hon var á Andebølle Højskole á Fjóni á vári í 1986 og á HF í Klaksvík árini 1986-1988.

Annika var skóti frá tí, at hon var 7, til hon var 14 ára gomul, og hon gekk í Ungdómshúsinum frá tí, at hon var 13, til hon var 18 ár.

– Eg arbeiddi ofta eftir skúlatíð, í vikuskiftinum og í summarfrítíðini frá tí, at eg var eini 13 ár. Eg arbeiddi í kiosk, pylsuvogni, egndi viðhvørt, og eg svaraði telefonini á bilstøðini Bil í fleiri ár.

Millum fólkaskúlan og háskúlan í Danmark arbeiddi hon á heysti 1985 á Kósavirkinum. Pápin hevði kjøthandil og matvøruvirki, og her arbeiddi hon í eitt ár, árini 1988-1989. Hon var eisini á skrivstovuni hjá Kjølbro Heilsølu á heysti 1989 og summarið 1990.

– Annars arbeiddi hvørja summarfrí, meðan eg las á Århus Universiteti, leggur hon aftrat.

Eftir lokna útbúgving, fekk Annika starv sum setursskrivari.

– Eg byrjaði sum barsilsavloysari í nakrar mánaðir, og var síðan í føstum starvi frá juni 1998 til november 2007, tá eg tók við starvinum sum stjóri í Granskingarráðnum, sum er tíðaravmarkað í fimm ár.

Annika Sølvará hevur verið forkvinna í Leiklistaráðnum síðan august 2004, har seinni skeiðið av tveimum endar nú. Hon hevur annars verið í fleiri nevndum og arbeiðsbólkum, bæði í Føroyum og í uttanlands.

– Privat havi eg verið virkin í fleiri felagsskapum, ikki minst í Amnesty International, og eg eri eisini í nevndini í Demokratiu nú, sigur Annika Sølvará.